## Selja meiri olju

Saudiarabia er heimsins størsta oljuframleiðaraland, og nú hava myndugleikarnir har gjørt av at skrúva kranarnar eitt sindur meiri frá. Sum er framleiðir Saudiarabia 9,45 milliónir tunnur um dagin, men í næsta mánaði verða 300.000 tunnur pumpaðar afturat um dagin. Eygleiðarar siga, at avgerðin er tikin eftir trýsti frá amerikanska forsetanum, George W. Bush, sum er á vitjan í Miðeystri, og Iran hevur eisini funnist at avgerðini.



*Saudiarabiska avgerðin fekk oljuprísin at fella eitt vet (Mynd: Vísir)*

## Kvinna datt oman

Ein 28 ára gomul donsk kvinna doyði leygardagin, tá hon datt oman á tí 800 metrar høga fjallinum Store Malene tætt við Nuuk. Løgreglan í býnum sigur, at kvinnan datt einar 300 metrar oman eftir fjallinum, og at hon eftir øllum at døma doyði beinanvegin. Store Malene er sera bratt, og fleiri fólk eru dottin oman har fyrr. Løgreglan í Nuuk sigur, at fólk, sum ikki eru staðkend har á leiðini, eiga ikki at fara niðan á fjallið einsamøll.



*Føroyski sjúklingavegleiðarin, Elionora Olsen, kennir bæði føroyskan hugburð og mentan umframt donsku heilsuskipanina. Og tað týdningarmikið, tá ið hon skal hjálpa sjúkum føroyingum á Ríkissjúkrahúsinum, sigur hon (Mynd: Peter Clausen)*

# Føroyingar krevja minni pínudoyvandi

**Á hvørjum árið verða fleiri føroyskir sjúklingar sendir til Danmarkar til viðgerðir. Flestu av hesum verða sendir til Ríkissjúkrahúsið. - Føroyingar hava ikki altíð lætt við at seta donsk orð á egnan tørv, og teir tora ikki so væl at seta krøv, sigur føroyski sjúklingavegleiðarin á Ríkissjúkrahúsinum, Elionora Olsen**

HEILSUVERK
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Hóast flestu føroyingar skilja danskt, so merkir tað ikki altíð, at ein føroyingur uttan trupulleikar kann spyrja um allar heilsuspurningar á donskum. Tí kennist tað mangan sum ein lætti fyri føroyskar sjúklingar á at hava ein føroying, sum kennir skipanina.

Føroyski sjúklingavegleiðarin á Ríkissjúkahúsinum, Elionora Olsen, er føroyska røddin í danskt mælta sjúkrahúsinum, ein stuðul hjá teimum, sum kenna seg hjálparleys í nýggju umstøðunum.

Elionora Olsen flutti longu í 1966 úr Klaksvík til Keypmannahavnar, har hon lærdi til sjúkrarøktarfrøðing. Men hóast hon hevur drúgvar royndir í donsku sjúkrahúsverðini og hevur búð niðri líka síðani, so er hon framvegis føroyingur við stóra F, sigur hon avgjørd. Og tað er ein styrki í arbeiðnum sum sjúklingavegleiðari á Ríkissjúkarhúsinum.

- Føroyingar og danir eru ikki eins, staðfestir hon avgjørd.

- Munirnir eru ikki altíð eyðsýndir, men teir eru har. Føroyingar eru ikki so útfarandi sum danir, teir snakka ikki so nógv og spyrja heldur ikki eins nógvar spurningar sum ein vanligur dani, greiðir Elionora Olsen frá.

- Hetta merkir sjálvandi ikki, at teir ikki sita inni við eins nógvum spurningum. Tað sama ger seg galdandi við pínudoyvandi evnum. Føroyingar krevja minni pínudoyvandi medisin enn danir, men tað merkir sjálvandi ikki, at teir ikki merkja pínu.

### Tigandi føroyingurin

Donsk starvsfólk eru ikki altíð varug við málsliga og mentanarliga munin, tí føroyingar hava ikki øðrvísi útsjónd enn danir, sigur Elionora Olsen sum hevur gjørt nógv fyri at gera føroyska sjúklingin meira sjónligan í donsku skipanini.

- Danska málið kann eisini vera ein forðan, sigur føroyski sjúklingavegleiðarin.

Føroyingar skilja danskt, men teirra danska mál umfatar orð og setningar frá gerandisdegnum. Tað er ikki tað sama, sum at tey duga at orða seg um sjúku og ótta.

Elionora Olsen hevur arbeitt við føroyskum sjúklingum síðani 1986, fyrst á Hotel Tórhavn síðani á Ríkissjúkrahúsinum, og hon sær eina broyting í føroyska hugburðinum.

- Ættarliðið hjá mínum foreldrum vóru nógv meira nøjsom, nógv teirra vóru ikki von við so nógv og vóru eisini meira sjónliga religiøs. Og so var danska samfelagið teimum eisini meira fremmant.

- Í dag hava flestu føroyingar ferðast uttanlanda, og føroyskir sjúklingar hava sett seg inn í, hvørja sjúku teir hava. Teir finna seg ikki longur í øllum, sigur Elionora Olsen.

- Føroyingar er tó framvegis minni spyrjandi enn danskir sjúklingar – eisini yngri føroyskir sjúklingar niður í 40 árs aldur, staðfestir føroyski sjúklingavegleiðarin, sum mangan upplivir, at føroyskir sjúklingar hava trupult við at orða seg á donskum og ynskja ikki at vita ov nógv um sjúkuna.

### Einsamalli sjúklingurin

Hóast ferðasambandið er vorðið nógv betri, og fólk ferðast meira, liggja føroysku klettarnir kortini fjart frá danska høðvusstaðnum. Og føroyskir sjúklingar í Keypmannahavn kunnu kenna seg avskornar frá familju og vinum.

- Flestu hava onkran við sær úr Føroyum. Men nøkur hava ikki familju, ella familjan hevur ikki møguleika at koma við. Og tá verði eg ofta brúkt í staðin, sigur Elionora Olsen.

Hon fær at vita um allar føroyskar sjúklingar, sum koma á Ríkissjúkrahúsið, og veit eisini um føroyingarnir, sum verða innlagdir á Bispebjerg og Hvidovre.

- Málið er, at hvør føroyingur fær eina vitjan. Men eftirhondini er tað so mikið nógv, at eg fái ikki tíð til alt. Tí má eg raðfesta. Tey sum ongan avvarandi hava, fáa hægstu raðfesting.

Longu í 1986 var tørvurin á einum føroyskum sjúklingavegleiðara á Ríkissjúkrahúsinum frammi, men starvið varð ikki sett á stovn fyrr enn í 2001. Í 2006 flutti sjúklingavegleiðarin úr Hotel Tórshavn inn á Ríkissjúkrahúsið.

- Eg má siga, at tað er í allar hægsta grad brúk fyri mínari funktión, sigur Elionora Olsen, sum sær seg sum eitt slag av umboðsmanni fyri føroysku sjúklingarnar.

- Tað er ikki líka mikið fyri ein føroyskan sjúkling, um hann skal bíða í tveir ella 14 dagar. Tí er tað partur av mínum arbeiði, at fáa skipan og starvsfólk at skilja, at tað er ikki tað sama, um sjúklingurin kemur frá Østerbro ella úr Føroyum.

Sambært Elionoru Olsen møtir hon stórari vælvild millum starvsfólkini. Tey skilja støðuna, men hugsa bara ikki altíð um tað.

- Tí er tað tørvur á, at onkur minnir á hetta regluliga.

### Týdningarmikið samstarv

Føroyski sjúklingavegleiðarin heldur samstarvið millum føroyska heilsuverkið og ríkissjúkrahúsið vera fyrimyndarligt, og hon sær nógvar fyrimunir fyri føroyskar sjúklingar.

- Nú verður nógv tosað um at samstarva við sjúkrahús aðrastaðni, men eg dugi ikki at síggja fyrimunin við at senda sjúklingar runt til ymisk sjúkrahús í ymiskum londum. Eg vildi í øllum førum treyðugt verið ein gomul gomul kona úr Svínoy, sum verður send til sjúkrahús í Aberdeen.

### FAKTA

Uppgávan hjá sjúklingavegleiðaranum er at hjálpa og vegleiða sjúklingum og avvarðandi teirra, ið eru ávíst úr Føroyum. Hetta kann umfata at vera:

- Hjásitari við læknasamrøður.
- Við til at loysa trupulleikar ella misskiljingar viðvíkjandi viðgerð, røkt ella tænastu, ið ikki kan loysast saman við starvsfólkinum á deilduni.
- Við til Kanningar og viðgerð.
- At vitja innlagdar sjúklingar, ið ikki hava samband við Sjúklingheimið Tórshavn.
- Vegleiða um rættindi sum sjúklingur.
- Vegleiða um klagu og endurgjaldingarmøguleikar.
- Hjálp til meira upplýsing.

Uppgávan hjá sjúklingavegleiðarinum er eisini at vera eitt bindiliðið millum viðgerðarstøðini í Danmark og Sjúklingaheimið Tórshavn.